Skálafjarðarsiglingin tikin upp aftur

Tað verður gamla Ternan, sum skal skal røkja rutuna fyribils

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú verður skálafjarðarsiglingin hjá Strandferðsluni tikin uppaftur

Ætlanin er, at gamla Ternan skal røkja siglingina, sum byrjar fyrst í næstu viku.

Gamla Ternan hevur í vetur røkt siglingina um Vestmannasund saman við Sam.

Fyri stuttari tíð síðan varð stóra Ternan sett at røkja siglingina um Vestmannasund og tí er nú gamla Ternan tøk til skálafjarðarsiglingina.

Í løtuni verða ymsar umvælingar gjørdar umborð á gomlu Ternuna, men fyribils er ætlanin, at hon skal byrja uppá skálafjarðarsiglingina týsdagin. Men tað verður lýst, nær tað verður

Strandferðslan sigur, at hetta er ikki ein varandi loysn. Tí arbeiðir stovnurin eisini við at kanna møguleikarnar at leiga eina skjóttsiglandi ferju í einar 2-3 mánaðar fyri at vita, hvussu hetta skipaslagið roynist á hesi farleiðini.

Strandferðslan sigur, at tað er týdningarmikið, at flutningskervið er liðiligt og at ein slík, skjóttsiglandi ferja eisini er tøk at seta í aðrar eftir tørvi og tá ið umstøðurnar annars loyva tí.

Samstundis, sum Skálafjarðarsiglingin verður tikin uppaftur, heldur koyringin við snarbussinum uppat.

Kaupthing í nýggj høli

Hósdagin var móttøka ísamband við, at Kaupthing flutti í nýggj høli við Tinghúsvegin. Kaupthing lat í hesum sambandi Eivør Pálsdótir gávu

DAGFINN OLSEN

Felagið Kaupthing er flutt í nýggj høli við Tinghúsvegin í Havn. Hetta eru húsini, har Føroya Sparikassi helt til, áðrenn hesin fyri kortum flutti í húsini Yviri við Strond.

Í samband við, at Kaupthing flutti í nýggju hølini, var móttøka hódagin seinnapartin.

Í samband við móttøkuna og flytingina lat Kaupthing eisini eina gávu. Nýggja felagið í føroyska fíggjarheiminum lat gávu til nýggja songfulgin á føroyska stjørnuhválvinum. Kaupthing lat Eivør Pálsdóttir eina gávu til fløguinnspæling.

Stjórin í Kaupthing, Petur Holm, sigur, at talan er um gávu til eina dygdar fløgu og fløgan hevur ikki fyri neyðini at verða útgivin, men heldur kann talan verða um eina fløgu, sum Eivør kann nýta í lýsingarfremjandi tiltøkum og fyri at koma sær fram. Kanska eisini uttan fyri landoddarnar. Eivør Pálsdóttir er av yngstu, men best umtóktu, nøvnum í føroyska tónleikaheiminum í dag. Gávan frá nýggjasta felagnum í føroyska fíggjarheiminum má sigast at falla á eitt stað, har tað kann væntast, at framtíðin er bjørt og har slík gáva kann væntast at bera frukt.

Kaupthing byrjaði sítt virksemi í Føroyum hin 1. mars 2000. Síðani hava Kaupthing og Føroya Sparikassi í felag stovnað felagið Kaupthing Føroyar. Felagið bjóðar tænastur og ráðgeving innan handil og virðisbrævamarknaðin.

Myndir: Jens Kr. Vang

ELEKTRON

KT-grannskoðari til Elektron

Til KT-menningar- og rakstrardepilin fyri føroysku peningastovnarnir og Toll- og Skattstovu Føroya, sóknast vit eftir einum KT-grannskoðara til at fyriskipa grannskoðanina av stýri- og brúkaraskipanum. KT-pallurin er í høvuðsheitum grundaður á eina IBM S/390 meginteldu umframt eina røð av miðspjaddum Windows NT umhvørvum, tengdar í eitt felags routaranet.

Arbeiðsøkið
Tú kemur at leggja til rættis, fremja og gera frágreiðingar um grannskoðanina av stýris- og brúkaraskipanum umframt teimum miðspjaddu NT eindunum. Starvið hevur beinleiðis ávísing til nevndina hjá Elektron, ið er sett saman av stjórunum hjá størstu kundunum og eigarunum.

Grannskoðanin verður framd í samstarvi við eitt uttanhýsis grannskoðarafelag umframt ein arbeiðsbólk, ið er settur saman av innanhýsis og uttanhýsis grannskoðarum hjá kundunum. Herumframt vil trygdarleiðarin á Elektron vera ein náttúrligur samstarvsfelagi. Grannskoðanin á Elektron verður fyriskipað eftir „Bekendtgørelse om systemrevisionens gennemførelse i fælles datacentraler" og er undir eftirliti av Det Danske Finanstilsyn.

Førleikakrøv
Sum nevnt omanfyri, er talan um eitt sera breitt arbeiðsøki, samstundis sum talan er um nógvar og ymiskar avbjóðingar. Vit vænta ikki, at tú framman undan megnar alt til fulnar og eru sjálvandi sinnað at geva rúmd fyri neyðugum útbúgvingum, í einari skiftistíð, har tú yvirtekur grannskoðanina frá uttanhýsis grannskoðaranum, so hvørt førleikin búnast.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur í minsta lagi 1-2 ára royndir við grannskoðan av stýris- og brúkaraskipanum, antin á S/390 ella Windows NT skipanum.

Somuleiðis er tað ein fyrimunur, um tú hevur eina bókliga bakgrund innan KT, handilsháskúla ella líknandi útbúgving á Bachelor stigi. Tú hevur eisini CISA- ella ESL-prógv - ella ætlanir at fáa eitt.

Tú hevur góð samstarvsevnir og kanst arbeiða sjálvstøðugt. Tú ert íðin og hevur áhuga fyri at menna teg yrkisliga á ymiskum økjum innan KT-grannskoðan og trygd. Tú dugir væl at greiða frá tekniskum og torgreiddum sjónarmiðum, bæði í talu og á skrift.

Vit bjóða
Elektron kann bjóða eitt spennandi og kveikjandi arbeiðsumhvørvi, við góðum og dyggum starvsfeløgum. Góðar útbúgvingar- og menningarmøguleikar, har tú kanst fara breitt, líka væl sum djúpt innan KT-grannskoðan og trygd.

Tú fært møguleikar fyri at taka lut í øllum pørtum innan menning av skipanum. Frá forkanning, har trygdarsjónarmið verða umrødd, til íverksetingina, tá endaliga góðkenningin fer fram. Vit bjóða sjálvandi eisini kappingarføra løn.

Ynskir tú nærri at vita um starvið, ert tú vælkomin at ringja ella senda e-bræv til Niels Christian Nolsøe, stjóra á tlf. 31 45 05 ella ncn@elektron.fo

Umsókn
Umsókn við viðkomandi skjølum, skulu verða okkum í hendi, í seinasta lagi tann 17. juli 2000.

PF ELEKTRON
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 314505 - FAX: +298 316384
e-mail: info@elektron.fo

P/F Elektron er størsta KT-fyritøka í Føroyum, við umleið 55 starvsfólkum og einum nettoumsetningi í 1999 uppá umleið 40 mió. kr.

P/F Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Vit veita nærum allar tænastur innan edv til kundar okkara, herímillum kanningar av ymiskum tekniskum og handilsligum viðurskiftum, skipanarmenning og rakstur av edv-skipanum.

Størstu partaeigarirnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri.

stephanssons hús

Magni í mótálop

Magni Arge er bjartskygdur. Stjórin á føroyska flogfelagnum hevur sett túratali› í summar upp á 27. Í fjørsummar var tali› 23.

Mynd: Jens Kristian Vang

ATLANTSFLOG. Í summar stendur Atlantsflog fyri ikki færri enn 27 fráfer›um um vikuna millum seks lond.

HØGNI MOHR

Í dag fer Atlantsflog undir fyrstu summarfer›aætlanina vi› tveimum flogførum, sum felagi› eigur einsamalt.

Klokkan hálvgum níggju í gjáramorgunin lendi flogfari›, sum Atlantsflog keypti sær í mars, aftur í Vágum. Fimtan ára gamla BAe-200 flogfari› hevur veri› leiga› t‡ska flogfelagnum, Lufthansa, og hevur einamest flogi› úr München.

Reglusamari flúgving

Summarfer›aætlanin er galdandi til 20. august. Komandi tveir mána›arnar ber sostatt til at sleppa millum Keypmannahavn og Vágar tvær reisur um dagin, og í samstarvi vi› Air Iceland ver›ur flogi› fimm fer›ir um vikuna til og úr Íslandi. Tvær reisur um vikuna heldur Atlantsflogfari› lei›ina fram úr Íslandi til Narsarsuaq í Grønlandi.

Eisini sambandi› vi› Skotland er betra›. Atlantsflog fl‡gur nú tvær fer›ir um vikuna til Aberdeen og einafer› til Glasgow. Og royndirnar vi› flúgving til Noregs hava veri› gó›ar. Stóra undirtøkan á noregslei›ini hevur fingi› føroyska flogfelagi› at flúgva tvær fer›ir um vikuna millum Vágar og Stavanger.

Nógvir føroyingar arbei›a í norsku fiski- og oljuvinnuni og økti samhandilin millum Noreg og Føroyar, serliga í alivinnuni, sæst aftur á bíleggingartølunum hjá Atlantsflogi.

Fráfer›irnar um vikuna eftir summarfer›aætlanini eru tilsamans 27 í tali.

Fleiri gestir

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, er bjartskygdur, nú turbulenta tí›in undir »kampagnu-strí›num« millum Atlantsflog og danska kappingarneytan fyribils er fjara› av. Sambært stjóran er danmarkarlei›in hjá felagnum enn sera álítandi og stø›ug. Tali› á upptiknum sessum liggur um 90 prosent.

Føroyska flogfelagi› hevur lagt stóra orku í at marka›arført Føroyar sum mi›depilin í Nor›uratlantshavinum. Faldarar, sum grei›a frá um økta flogvirksemi›, eru sendir øllum nor›urlondum og T‡sklandi.

Sum á›ur sta›festir Magni Arge, at fólkatali› í Føroyum avmarkar virksemi› hjá felagnum. Men til ber kortini at taka fer›afólkavinnuna vi› í metingunum av framtí›ini. Í hesum sambandi væntar stjórin sær økt virksemi á íslandslei›ini. Íslendska fer›avinnan er sambært stjóran á lei› tíggju fer›ir størri enn hin føroyska, og nógvir gestir í Íslandi eru úr Japan og USA. Serliga amerikumonnum dámar at fer›ast vi› fullari fer›.

- Teir vilja helst vitja eini tr‡ lond eftir f‡ra døgum, og hetta hava vit havt í huga, tá i› vit hava lagt til rættis fer›aætlanina úr Íslandi. Mikudagar ber til at fara sonevndar »daytrips« úr Íslandi til Føroya. Flogfari› fer úr Íslandi klokkan 7.15 og ver›ur aftur klokkan 20.10, sigur Magni Arge.

Nú n‡ggja føroyska flogfari› av álvara fer at tæna sínum endamáli, økist starvfólkatali› á Atlantsflogi munandi. Millum fimtan og tjúgu fólk eru komin afturat. Um summari› starvast eini 85 fólk hjá flogfelagnum.

Magni Arge skírir n‡ggju fer›aætlanina »ein offensiv av eini a›rari ver›«.

Lesi› Sosialin t‡sdagin

M‡tan um d‡rar føroyska fer›ase›lar

Nógvir føroyingar og fer›afólk, sum koma, ella ætla sær til Føroya, hava javnan á munni, hvussu d‡rt ta› er at flúgva til Føroya. Men hagtøl vísa, at líti› hald er í hesum uppáhaldum.
Sosialurin t‡sdagin.



AMSTERDAM 2997,- Tur/retur via Billund **) Ferðaavgjøld íroknað	**ATHEN** 3296,- Tur/retur via Keypmannahavn *) Ferðaavgjøld íroknað
LISSABON 3296,- Tur/retur via Keypmannahavn *) Ferðaavgjøld íroknað	**LONDON** 2991,- Tur/retur via Billund **) ella Keypmannahavn *) Ferðaavgjøld íroknað
NICE 3107,- Tur/retur via Billund *) Ferðaavgjøld íroknað	**PARÍS** 3010,- Tur/retur via Billund **) Ferðaavgjøld íroknað
VENEDIG 3095,- Tur/retur via Keypmannahavn *) Ferðaavgjøld íroknað	**DUBLIN** 3094,- Tur/retur via Billund *) Ferðaavgjøld íroknað

Bíligir ferðaseðlar frá Maersk
Frá 1. juli til og við 13. august ber til at ferðast við flogfari millum Føroyar og onnur lond í Evropa, so bíliga sum ongantíð áður. Einastu treytir, at fáa bíligar ferðaseðlar, eru vanligar apex-treytir, umframt at minst tvey vaksin skulu ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

Børn undir 12 ár fáa 50% í avsláttri av flogprísium, tá ferðast verður saman við vaksnum

Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan og í tíðarskeiðinum 1. juni 2000 til og við 16. juli 2000. Bíleggingar kunnu ikki broytast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Minst tvey vaksin skulu ferðast saman.
**) Gisting eina nátt í Danmark (ikki íroknað)*
***) Flogið verður víðari sama dag*

MAERSK AIR